# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkraflutningstænastan

Vit søkja eftir summarferiuavloysarum fyri tíðarskeiðið 2008. Talan er eisini um at avloysa við feriu/sjúku og eftir tørvi.

Sjúkraflutningstænastan er ein deild við nógvum ymiskum uppgávum. Ein av høvuðsuppgávunum er at vera ein bráðfeingishjálp í samband við lívbjargandi arbeiði. Harnæst er uppgávan flutningur av sjúkum og skaddum fólki og fólkum, ið eru rørslutarnað. Eisini hava vit ábyrgd av øllum portørarbeiði, ið er á Landssjúkrahúsinum. Alt hetta setir stór krøv til starvsfólkið, sum mangan kemur at arbeiða undir serstøkum umstøðum.

Starvsøkini fevna um Streymoy, Eysturoy, Vágoy og Sandoy. Vit starvast í løtuni umleið 35 fólk. Deildin hevur 14 bilar, íroknað 10 sjúkrabilar. Vaktsentralurin, ið hoyrir til deildina, er saman við sjúkrabilunum á hvørjum starvsøki mannaður alt samdøgrið.

Tann/tey, ið sett verða, koma at arbeiða út frá støðini í Tórshavn, Vágum og Eysturoynni í skiftandi vaktum og fáa neyðugu upplæring í samband við starvið.

**Nýsett starvsfólk skulu hava** grundskeið/upplæring í uml. 14 dagar, innan tey kunnu virka sum hjálparfólk í sjúkrabilinum. Tey skulu hava vegleiðing frá einum viðgerða og hava møguleikar fyri øðrum grundskeiðum, ið eru neyðug fyri at røkja starvið til fulnar. Vit krevja, at tann, ið settur verður, skal upp til eina praktiska roynd í lívbjargandi arbeiði eina ferð um árið, fyri at tryggja, at tænastan livir upp til eitt dygdargott arbeiði.

**Vit vanta at tú:**
- er tænastusinnaður, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni
- kann síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- hevur evni til at orða teg bæði munnliga og skrivliga
- kann taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt
- skalt verða fúsur til at broyta teg við nútíðina

**Førleikarkrøv:**
- Koyrikort til bil og 1. hjálpar prógv
- Hevur fylt 21 ár og reina revsiváttan
- Maður: minst 170 cm og kunna lyfta 50 kg yvir bringuhædd
- Kvinna: minst 165 cm og kunna lyfta 30 kg yvir bringuhædd
- Góðan fysik/heilsu/hoyrn og litsjón við læknaváttan
- Telduførleiki á brúkarastøði

Í samband við starvsfólkapolitikkin og virðisgrundalagið skal tann, ið settur verður, lúka øll krøv, ið kravd verða. Vit leggja stóran dent á trivnaða og menning.

**Nærri fæst at vita** við at venda sær til Jákup Nolsøe, leiðara, telefon 304503 ella til Gunnar Hjelm, virkandi varaleiðara, telefon 304502.

**Umsóknarfreistin er** 2. apríl 2008 kl. 12.00

## Deildarleiðari til Ljósmøðratænastuna

Eitt starv sum deildarleiðari á føðideildini í nýggju Ljósmøðratænastuni er leyst at søkja til setan 1. mai 2008.

Deildarleiðarin hevur, við tilvísing til leiðandi ljósmóðir, ábyrgdina av dagliga deildarvirkseminum, starvsfólkaleiðslu, deildarjáttanini og fakligu menningini.

Í løtuni fer fram ein avbjóðandi bygnaðarbroyting á deildini, m.a. á barsilsøkinum.

**Førleikakrøv**
- Prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- Royndir innan viðgongu, føðing og barsilstíð
- Leiðsluroyndir og /ella sinnaður at fara undir leiðsluútbúgving
- Teldukunnleiki

**Vit ynskja ein deildarleiðara, ið**
- fremur sunnan ljósmøðrahugburð
- er eldhugað/ur, áræðin, jalig/ur og framskygd/ur
- hevur góð samskifti- og samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðugt

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Eyðfríð L. Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, lseydja@ls.fo

**Umsóknarfreistin er** 28. apríl 2008

## Læknaskrivaranæmingar

Tvey læruppláss sum læknaskrivaranæmingar eru leys at søkja til setan 1. september 2008.

Talan er um eina lærutíð uppá 2 ár, harav 15 vikur eru býttar í 5 modulir á 3-4 vikur á handilsskúla í Danmark. Hin parturin er praktikktíð við hollari undirvísing og einari rokeringsætlan á Landssjúkrahúsinum. Fyrstu 3 mánaðirnir er ein royndartíð.

**Upptøkukrøv:**
HG (2 ára) ella HH
HF- ella studentsprógv + HG prógv (18 vikur) frá handilsskúla

**Førleikakrøv:**
- Góður førleiki í føroyskum og donskum
- Góður førleiki í teldutøkni og tekstviðgerð
- Góð samstarvsevni/samskiftisevni
- Góður røkjuskapur
- Kunnleiki í latíni er ein fyrimunur

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin er** mánadagin 31. mars 2008 kl. 12.00 (og ikki sum áður lýst, mánadagin 28. mars 2008)

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo )

**Ljósmøður**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008

**Ergoterapeutur**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Starvsfólk til Húsavørðin**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/pleygari til Psyk D1**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G3, onk. amb.**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008
kl. 12.00

**Introduktiónsstarv í Psykiatri**
Umsóknarfreistin er 25. mars 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G3 fyri deildarleiðara**
Umsóknarfreistin er 26. mars 2008
kl. 12.00

**Summarferiuavloysarar**
Umsóknarfreistin er 27. mars 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Útistovu**
Umsóknarfreistin er 28. mars 2008
kl. 12.00

**Sálarfrøðingur**
Umsóknarfreistin er 28. mars 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G3**
Umsóknarfreistin er 31. mars 2008
kl. 12.00

**Radiografar/Røntgensjúkra - røktarfrøðingar**
Umsóknarfreistin er 11. apríl 2008

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo